# Hvítt pulvur sendi gentu á sjúkrahúsið

**Leygarnáttina fekk løgreglan í Havn boð frá einum skeinkingarstað í Havn, at ein ung genta varð illa fyri, og at gentan segði seg hava tikið okkurt hvítt pulvur**

LØGREGLAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sjúkrabilur varð sendur á staðið beinan vegin, og gentan var flutt á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum til kanningar.

Ein maður var afturhildin av starvsfólkum á skeinkingarstaðnum, tí tey høvdu illgruna um, at tað varð hann, ið hevði givið ungu gentuni hvíta pulvurið. Løgreglan kom á staðið og tók mannin við sær, men av tí at einki illgrunarvert varð funnið á honum, bleiv hann stutt eftir leyslatin aftur.

Unga gentan bleiv kannað á Landssjúkrahúsinum, men hon hevði tað eftir umstøðunum gott og bleiv koyrd heim til hús.

## Harðligur við unnustuna

Leygarnáttina varð ein maður tikin í miðbýnum í Havn, tí at hann var harðligur við unnustuna hjá sær. Maðurin og unnustan gjørdust ósamd uttan fyri eitt skeinkingarstað í miðbýnum, og øði spann í mannin, sum legði unnustuna niður á vegin og tók kvørkratak á hana.

Løgreglan bleiv boðsend, og maðurin varð handtikin. Málið verður nú viðgjørt sum eitt harðsskapsmál.

**tn**

## Roykur uttan eld

Stutt fyri nátturða sunnudagin fekk løgreglan í Eysturoynni fráboðan um, at eldur var í einum húsum í Fuglafirði.

Sløkkiliðið kom skjótt á staðið, og teir kundu staðfesta, at talan bert var um royk og ongan eld. Talan var um eitt ventilatiónsanlegg á loftinum, har ein motorur helst varð brendur saman. Nógvur roykur stóðst av hesum, men eldur var eingin. Húsini fingu ongan skaða av tilburðinum.

**tn**

## Herverk á deksbát

Sunnudagin fekk løgreglan í Eysturoynni fráboðan um, at onkur hevði verið umborð á 20-tonsaranum, Hamranes, sum liggur við bryggju í Runavík, og gjørt herverk.

Tveir rútar vóru brotnir umborð á deksbátinum, men ótangarnir, ið høvdu framt herverkið, høvdu ikki stolið nakað umborð. Eigarin av Hamranes var sjálvur burturstaddur, og tí er ógreitt, nær herverkið er gjørt.

**tn**

## Gjørdi seg inn á løgregluna

Um níggjutíðina sunnukvøldið bleiv løgreglan boðsend, tí at ein maður gekk og bar seg ófantaligani at í Sigmundargøtu. Løgreglan kom á staðið, og roynt var at fáa mannin at skikka sær eitt sindur betur.

Maðurin lat tó ikki við seg koma, og tá ið løgreglan ætlaði at taka hann við sær, gjørdi maðurin mótstøðu og gjørdu seg inn á eitt av løgreglufólkunum. Maðurin bleiv koyrdur í hondjørn og fluttur á politistøðina, og hann verður nú ákærdur fyri harðskap móti tænastumanni.

**tn**

# Kann vektina á seyði

**Olivia Danielsen, sum er lívfrøðislesandi á Fróðskaparsetrinum, vil nú hava greiðu á, hví miðalvektin á seyði er so ymisk kring landið**

HØVUÐSUPPGÁVA
*Jákup Mørk*

Hetta evnið hevur Olivia valt sær sum høvuðsuppgávu í samband við lesna sín.

Tað er vælkent, at vektin á lombum er ymisk í ymsu økjunum kring landið. Men enn hevur eingin nágreiniliga kannað eftir, hví hetta er so. Eitt nú hevur verið nevnt, at áseyðatal av lombum og hæddin av haganum eru viðurskifti, sum spæla inn, men nú skal so ein verulig greining gerast av hesum.

Sum liður í kanningini hevur Olivia í fyrstu syftu sent út spurnarbløð til 100 føroyskar bøndur. Her veður millum annað spurt um miðalvektina á lombunum, sum vórðu flett í heyst. Hvussu nógv lomb vórðu tikin. Um hvussu lembingin hilnaðist, hvussu nógvar tvílembur vóru og um seyðurin verður fóðraður um veturin.

### Hví er vektin so ymisk?

Tá greiða er fingin á miðalvektunum kring landið, verður næsta stigið at greinað tilfarið. Ætlanin er at samanbera miðalvektirnar í teimum ymisku hagapørtunum í mun til eitt nú: markatal, vídd á haganum, hvussu høgt hagin liggur, áseyðatal, tal av lombum, og hvussu lendið og bitið er í haganum.

Tað verður ofta sagt, at grasvøksturin er betur í hagapørtum, sum venda móti sólini. Ætlanin er tí eisini at kanna eftir, hvørt tað ávirkar støddina á seyðinum, hvønn veg hagin vendir. Eisini verður sagt, at seyðurin er størri norðan fyri enn sunnanfyri. Við at samanbera miðalvektirnar er ætlanin eisini at fá greiðu á hesum spurningum.

Skal ætlanin eydnast, er umráðandi, at so nógv hagtalstilfar sum gjørligt, verður fingið til vega, og heitir Olivia tí á bøndurnar um at taka sær tíð til hetta arbeiði eisini. Eitt arbeiði, sum væl kann vísa seg at verða til stórt gagn. Bæði hjá einstøku bóndunum men eisini fyri føroyskt seyðahald sum heild.



SPENNANDI STØRV Í KAUPTHING

Kaupthing stendur í vøkstri, og tí leita vit eftir dugnaligum og framsøknum starvsfólkum, sum hóska til væl skipaða starvsfólkalið okkara. Í fyrstu atløgu søknast vit eftir einum umsitingarligum leiðara og tveimum starvsfólkum til útlánsvirksemi.

UMSITINGARLIGUR LEIÐARI

Við tilvísing til stjórnin hevur umsitingarligi leiðarin ábyrgdina av dagligu umsitingini í felagnum, sum mennist sera nógv. Hetta merkir, at tú fært ábyrgd av at:
* gera hálvárliga og árliga roknskapin
* røkja dagliga bókhaldið og roknskapin
* avrokna í sambandi við virðisbrævahandil
* samskifta við kundar
* stýra gjaldførinum
* vera um starvsfólkini
* umsita tað, ið fyri fellur
* hava eftirlit við innanhýsis mannagongdum.

Vit vænta, at tú:
* megnar at hava skil á mongum viðurskiftum í einum
* orkar at bera byrðuna, hóast hon stundum er tung
* torir at arbeiða sjálvstøðugt
* krevur úrslit av tær sjálvum og tínum starvsfelagum
* dugir væl at samstarva
* hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir.

Harumframt halda vit tað vera týdningarmikið, at tú dugir væl enskt í skrift og talu, at tað fellur tær lætt at seta teg inn í nýggj viðurskifti, og at tú hevur hugsjónarligar tankar um, hvussu felagið kann mennast frameftir.

Vit bjóða tær:
* oddastarv við stórum avbjóðingum á høgum yrkisligum stigi
* týdandi sess í livandi fyritøku, sum alsamt mennist eftir altjóða lesti
* møguleika at vera lyklapersónur í hesi menning
* góða løn, sum verður avtalað serstakt.

STARVSFÓLK TIL ÚTLÁNSVIRKSEMI

Vinnulánsøkið og harvið eisini vinnulánsøkið hjá Kaupthing er vaksið og ment munandi seinastu tíðina, og vit søknast tískil eftir tveimum fólkum at arbeiða við vinnulánum.

Við tilvísing til leiðaran á vinnudeildini skalt tú:
* finna fram nýggj kundaevni og samskifta við tey
* røkja verandi kundar og veita teimum ráð um fígging og onnur fíggjarlig viðurskifti
* Hjálpa verandi og komandi kundum at avgreiða lánsmál og onnur fíggjarlig mál.

Vit vænta, at tú:
* vekjur álit
* megnar at skapa virðing fyri tær sjálvum og starvinum
* ert útvendur og lættur at samskifta við
* dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
* trívst í avbjóðingum
* hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti
* dugir væl enskt í skrift og talu.

Tað er ein fyrimunur men eingin treyt, at tú hevur hóskandi hægri útbúgving. Hinvegin er tað ein treyt, at tú hevur arbeiðsroyndir, sum hava týdning.

Vit bjóða tær:
* avbjóðandi starv á yrkisliga høgum stigi í livandi felagi, sum mennist støðugt
* góðan samstarvsanda í spennandi og mennandi umhvørvi við altjóða menningarmøguleikum
* góða løn, sum verður avtalað serstakt.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við leysu størvini á Kaupthing, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Peter Holm, stjóra.

Umsóknir skulu áðrenn 4. november sendast til:

KAUPTHING

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag p/f
Tinghúsvegur 14
Postsmoga 3090
110 Tórshavn
Telefonnummar: 351500
Heimasíða: www.kaupthing.fo